**TÓRSHAVNAR KOMMUNA**

**Upptøkureglur til frítíðarskúlar í Tórshavnar kommunu**

**Almennar reglur:**

Kommunan hevur tilboð um frítíðarskúla til børn frá forskúlaflokki til og við 2. flokk.

Tað er ábyrgd hjá foreldrum/avvarðandi at bóka pláss á frítíðarskúla til barnið.

Foreldur kunnu bóka frítíðarskúlapláss til barnið, tá barnið verður skrivað inn í fólkaskúla.

Tilmeldingin fer fram umvegis www.torshavn.fo. Lýst verður í miðlunum tíðarskeið fyri tilmelding til frítíðarskúla og skúla.

**Frítíðarskúlar eru skipaðir á henda hátt:**

Frítíðarskúlin á Argjahamri – børn úr Skúlanum á Argjahamri

Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini – børn í 1. og 2. flokki úr Sankta Frans skúla

Frítíðarskúlin við Botnánna – børn úr Kollafjarðar skúla

Frítíðarskúlin í Flatnagarði – børn úr Kaldbaks skúla

Frítíðarskúlin á Fløtum – børn úr Skúlanum á Fløtum

Frítíðarskúlin í Hoyvík – børn úr Hoyvíkar skúla

Frítíðarskúlin við Løgmannabreyt - børn úr Skúlanum við Løgmannabreyt

Frítíðarskúlin Látrið – børn úr Nólsoyar skúla

Frítíðarskúlin í Sankta Frans – børn úr forskúlaflokki í Sankta Frans skúla

Frítíðarskúlin Smílibýlið – børn úr Eysturskúlanum

Frítíðarskúlin á Velbastað - børn úr Velbastaðar skúla

--

Frítíðarskúlin í FRískúlanum í Havn – børn úr fRískúlanum í Havn

Frítíðarskúlin í Lítlaskúla – børn úr fRískúlanum Lítlaskúla.

**§ 1. Frítíðarskúlapláss og ávísingarreglur**

Tórshavnar kommuna miðar ímóti at tryggja øllum børnum í forskúlaflokki til 2. flokk tilboð um frítíðarskúla, og sum í fólkayvirlitinum eru skrásett at búgva í Tórshavnar kommunu.

Uppsagnarfreistin er 2 mðr. til tann 1. ella 15. í mánaðinum.

### a) Tilflytarar til kommununa

Foreldur, ið flyta til Tórshavnar kommunu í skúlaárinum, og sum ynskja pláss til barnið í frítíðarskúla, skulu seta seg í samband við Snarskivuna í kommununi.

### b) Flyta stovn

Foreldur, ið ynskja at flyta frítíðarskúla (og fólkaskúla), skulu fylgja uppsagnarfreistini sambært § 1.

Uppsagnarfreistin á 2. mðr er somuleiðis galdandi, um foreldrini við barninum flyta úr kommununi.

### c) Serligan tørv

Foreldur, hvørs barn hevur serligan ella bráðfeingis tørv, skulu senda teldupost til torshavn@torshavn.fo við frágreiðing um tørv. Tá hetta er gjørt, kann Barna- og ungdómsdeildin í kommununi, um hetta er neyðugt og møguligt, vísa á serlig pláss.

## § 2. Gjald og eftirstøða

Gjøld fyri frítíðarskúlapláss eru at síggja á www.torshavn.fo.

Fer eftirstøðan upp um 2. mðr., kann kommunan við fráboðan siga plássið upp – tó soleiðis, at kommunan ella barnaverndin frammanundan hevur viðgjørt spurningin, hvørt heimild er fyri fíggjarligum fríplássi. Eftirstøðan skal gjaldast, hóast plássið verður sagt upp.

## § 3. Klaga

Avgerðir, tiknar sambært hesi reglugerð, kunnu innan 4 vikur eftir, at kærari skrivliga hevur fingið avgerðina fráboðaða, kærast til landsstýrið.